umhvørvisstovan

ELFELAGIÐ SEV
LANDAVEGUR 92
POSTBOX 319
110 TÓRSHAVN
Føroyar

Argir hin 9. september 2019
Málsnr.: 19/00603-9
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Ingvard Fjallstein

**Viðvíkjandi: Góðkenning av umhvørvisárinsmeting til sólorkuskipan hjá SEV í Sumba**

Umhvørvisstovan góðkennir hervið, sambært § 16, stk. 1 í elveitingarlógini[1], umhvørvisárinsmeting fyri royndarverkætlan at framleiða ravmagn við sólorku.

## 1. Endamál

Endamálið við umhvørvisárinsmetingini er at tryggja, at ávirkanin av verkætlanini á náttúru, umhvørvi og onnur viðurskifti er væl lýst, so at sleppast skal undan óvæntaðum avleiðingum av verkætlanini.

## 2. Umsókn og málsviðgerð

SEV sendi hin 25. juni 2019 Umhvørvisstovuni umhvørvisárinsmeting fyri royndarverkætlan at framleiða ravmagn við sólorku.

### 2.1 Verkætlanarlýsingin

SEV ætlar at hava eina royndarverkætlan at framleiða ravmagn úr sólorku á fótbóltsvøllinum í Sumba í tvey ár. Sólorkuskipanin er gjørd úr monicrystaline silicon og verður sett á syðru helvtina á fótbólstvøllinum á Krossinum í Sumba. Fótbóltsvøllurin liggur á 70 - 80 metra hædd, og er hetta væl oman fyri bygdina. Tørvur er á umleið 3.500 $m^2$. Talan er um tíggju sólorkueindir, sum eru umleið 1.270 $m^2$ tilsamans.

Sólorkueindirnar verða bygdar upp í sektiónum, sum hvør verður heft niður á betongfundament, sum standa á vøllinum. Hæddin á eindunum er 140 cm. Girðingin rundan um vøllin, sum er 90-100 cm høg, verður standandi.

SEV roknar við, at sólorkustøðin fer at framleiða 160 MWh um árið. Tað svarar til 32 húski og lækkar $CO_2$ útlátið við umleið 110 tonsum um árið. Ongar broytingar verða gjørdar á vøllinum ella økinum kring vøllin, og einki endurskin (reflektión) skal verða frá sólorkustøðini.

Sólorkustøðini framleiðir javnstreym. Invertarar gera javnstreymin um til veksilstreym.

---

[1] Løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, við seinni broytingum.



Mynd 1. Sólorkustøð á fótbóltvøllinum í Sumba. Myndin snarað, so vísningurin er rættur.

## 2.2 Umhvørvisárinsmetingin

Sólorkuskipanin verður bygd á syðru helvtina á fótbólstvøllinum á Krossinum í Sumba. Tørvur er á umleið 3.500 $m^2$.

SEV hevur leitað eftir øki til sólorkustøð. Arbeitt hevur verið við einum øki nær vindmyllunum í Neshaga, men hendan ætlanin varð slept orsakað av vindviðurskiftunum í økinum. Tá vøllurin á Krossinum í Sumba, sum er nærum 7.000 $m^2$ til støddar, ikki verður brúktur, metir SEV hetta sum ein møguleika at royna sólorkuskipan. Uttan stórvegis fyrireiking kann ætlaða sólorkuskipanin setast upp, uttan at órógva verandi bø og haga.

SEV metir, at staðsetingin á vøllinum í Sumba hóskar væl, tí bygdin vendir suðureftir og hevur góðan sólargang.

SEV metir, at sólorka kann hava árin á umhvørvið. Mest verður hugsað um árin á landslagið og tað lívfrøðiliga margfeldið, har sólorkustøðir verða staðsettar. Stórar sólorkustøðir tørva nógv pláss. Hesi kunnu tí verða til ampa í landslagnum við tað, at tey taka búøki hjá plantum og djórum. Einki inntriv verður gjørt á náttúruna og landslagið í Sumba, tí at sólkyknurnar verða settar inni á fótbóltsvøllinum. Lendið á fótbólsvøllinum er graslíkisvøllur og verður liggjandi.

Afturskin (reflektión) frá sólkyknum kann verða til ampa fyri umhvørvið. Hugsast kann at vatnfuglur kann taka tær skyggjandi sólkyknurnar fyri at vera vatn, og tí kann vandi verða fyri samanbresti við sólkyknurnar. Hetta kann elva til, at fuglurin fær skaða og/ella doyr.

Kanningar benda tó á, at vandin fyri at fuglur stoytir saman við sólorkustøðum er lágur, men ikki ómøguligur og eigur hetta at kannast nærri. Til ber tó at viðgera sólkyknur á ymiskan hátt, soleiðis at afturskinið verður lágt.

Mett verður, at lítil og eingin ávirkan verður á onnur djór í nærumhvørvinum. Seyður sleppir ikki framat sólskipanini, tí at garðurin kring vøllin verður standandi.

Fótbóltsvøllurin liggur á 70 - 80 metra hædd omanfyri eystara part av bygdini og meiri enn 100 metur frá næstu grannum. Harafturat stendur hon innanfyri girðingina á vøllinum. Pláturnar eru viðgjørdar, so tær ikki skyggja so nógv. Harafturat hella sólkyknuplátunum so mikið lítið, at eitt møguligt endurskin verður sent uppeftir. Sólorkustøðin verður tí ikki so sjónligt frá bygdini. Tó eru nøkur hús, ið standa oman fyri vøllin. Hesi húsini eru seyðahús og møguliga summarhús, ið liggja væl burtur frá vøllinum. Ávirkanin av endurskini á skipaferðslu og flogferðslu verður mett at vera sera avmarkað.

Sólkyknurnar geva ikki óljóð frá sær, tá tær framleiða ravmagn. Møguliga verður eitt sindur av vindóljóði, men SEV metir ikki, at tað hoyrist fram um bakgrundsóljóðið. Tað verður nakað av óljóði, meðan støðin verður bygd, serliga tá ið undirlagið skal riggast til, tá ið tilfarið verður flutt á staðið, og tá ið orkustøðin verður sett upp.

## 2.3 Hoyring

Umhvørvisárinsmetingin varð lýst hin 10. juli 2019 við lýsing í blaði, sum verður borið í hvørt hús og á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni. Freistin at koma við hoyringarsvari var 15. august 2019.

Umhvørvisstovan fekk ongar viðmerkingar til lýsingina. Umhvørvisstovan hevur tó sett SEV nakar ískoytisspurningar, sum SEV hevur svarað nøktandi.

## 3. Avgerð

Umhvørvisstovan góðkennir umhvørvisárinsmetingina hjá SEV frá mars 2019.

Treytin fyri hesari góðkenning er, at verkætlanin verður framd, sum greitt er frá í umhvørvisárinsmetingini og eftirfylgjandi skjølum, her undir:

- At serligur dentur verður lagdur á vandaligt arbeiðslag í sambandi við tilrigging og uppseting.
- At økið verður ruddað væl, og alt óviðkomandi tilfar og burturkast beint burtur á rættan hátt í seinasta lagi ein mánað eftir at arbeiðið at seta støðina upp er liðugt.
- SEV skal regluliga skráseta skaddan ella deyðan fugl inni á økinum í verkætlanartíðarskeiðinum.
- Í seinasta lagi tríggjar mánaðir eftir at verkætlanartíðarskeiðið er farið, skal SEV senda Umhvørvisstovuni ein samandrátt av verkætlanini viðvíkjandi omanfyri umrøddu umhvørvisviðurskiftum.
- Um so er at verkætlanin steðgar, tá tvey ár eru farin, skal SEV taka alla útgerðina niður og beina hana burtur av økinum í seinasta lagi tríggjar mánaðir eftir.

- Um SEV ætlar, at verkætlanin heldur fram, eftir at tvey ár eru farin, skal SEV boða Umhvørvisstovan frá hesum í seinasta lagi tríggjar mánaðir fammanundan, haruppi í við samandrátti av omanfyri umrøddu umhvørvisviðurskiftum fyri tað verkætlanartíðina, sum farið er.
- SEV boðar Umhvørvisstovuni frá, tá arbeiðið er byrjað, og tá tað er liðug.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um neyðugt er við øðrum góðkenningum sambært aðrari lóggávu.

**4. Eftirlit**

Umhvørvisstovan hevur eftirlit við, at treytir í hesi góðkenning verða hildnar.

**5. Kæra**

Henda avgerð kann kærast til landsstýrismannin við innlendismálum. Møgulig kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum sendir kæruna til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí at avgerðin er almannakunngjørd. Kærur skulu vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 25. september 2019.

Ingvard Fjallstein, málsviðgeri / Suni Petersen, deildarleiðari

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo